# FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-146_3
dags. 14-06-2011

**Mentamálaráðið**
**att.: Jenny Lydersen**

Teldupostur: mmr mmr.fo

***Viðv.: Tygara teldupostur daf. 03.06.11, skúladagataliðí fólkaskúlanum 2011-2013***

Stýri Føroya Kommunufelags hevur á fundi 14. juni, havt omanfyri nevnda mál til viðgerðar.

Føroya Kommunufelag tekur undir við, at lærarar í fólkaskúlanum fara á skeið í fakligari lesing og kunningartøkni.

Vit skilja tó ikki, at tað er orsøk til at lækka skúladagatalið. Skúlaárið er 198 dagar, men lærararnir hava ikki rætt til frítíð alla skúlafrítíðina. Vit halda tí, at nevndu skeið kundu verið, meðan næmingarnir eru í summarfrí ella í heystfrítíðini.

PISAúrslitini hjá okkum hava verið vánalig, tí halda vit, at tað er eitt løgið signal at lækka skúladagatalið, tá hetta er óneyðugt. Harumframt verður aðrastaðni arbeitt við at hækka skúladagatalið; í Danmørk er ætlanin at hækka tað til 209 dagar.

fyri felagið

Sveiney  Sverrisdóttir, skr.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo